# Smágentur hjá HF royna seg í DM

**Hósdagin fóru smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag til Danmarkar, har tær í hesum døgum skulu royna seg í kappingini um danmarksmeistaraheitið**

FIMLEIKUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Liðið, ið er farið til Danmarkar, er smágentur A, og tað vóru júst tær, ið gjørdust føroyameistarar í rútmiskum fimleiki í februar mánað.

**Kappast í tveimum íðkanum**

Sjálv kappingin um DM fer fram í Odense, og kappast verður leygardagin í Odense Idrætshal. Tær føroysku genturnar skulu royna seg í tveimum ymiskum íðkanum. Onnur er ein frí íðkan, meðan hin íðkanin skal verða við hondamboðum.

Í tí førinum, har íðkanin er við hondamboðum, luttaka tey donsku liðini við eini amboðsíðkan við vimpli, meðan tær føroysku genturnar luttaka við gjarum.

Steðgurin hjá føroysku gentunum í Danmark er ikki drúgvur, tí tær koma heim aftur longu sunnudagin.

Spurningurin er so, um smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag fara at standa seg eins væl og onnur lið hjá felagnum, ið áður hava tikið lut í DM við glæsiligum úrsliti.

GÍ-KÍ:

# Tað er trýst á gøtumonnum

**KÍ venjarin hevur í vikuni aftur og aftur mint sínar menn á, hvussu vandamikið tað er at hitta sovandi úlv, sum Ove Flindt Bjerg málber seg í Norðlýsinum**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

*joannes@sosialurin.fo*



*Seinastu trý árini hava gøtumenn ligið eftirá, tá KÍ hevur vitjað*

Tað er ikki frítt, at tað er trýst á GÍ, tá ið teir í morgin fara at fáa vitjan av KÍ. Í tveimum teimum fyrstu umførunum hava teir einki fingið burturúr ímóti mótstøðuliðum, sum teir undan kappingarbyrjan mettu seg at hava møguleikar ímóti. Um væl hevðí havt viljað til, so høvdu gøtumenn havt seks stig. Nú hava teir einki, og í fjórða og fimta umfari skulu teir spæla á útivølli ímóti VB og HB.

Tí er uppgerðin ímóti klaksvíkingum á heimavølli ógvuliga týdningarmikil. Í GÍ vóru teir ikki misnøgdir við avrikið og hugburðin í Fuglafirði. Teir meta tað vera gott tekin, at tað tvær ferðir eydnaðist at koma upp á javnt, og teir iðra seg um, at teir seinna partin av 2. hálvleiki góvu ÍF so nógvar møguleikar at fara í snarálop.

Í Gøtu hava teir, sum so manga aðra staðni kring landið, verið darvaðir av veðrinum. Hóskvøldið vandu teir ikki, men í gjár varð roknað við, at allir teir, sum spældu ímóti ÍF, fara at verða tøkir í morgin. Í Fuglafirði noyddist Atli Gregersen at taka seg aftur, tí hann fekk eitt trælær, sum teir kalla tað, men hann er tøkur aftur.

Í Klaksvík hevur høgættin heldur ikki verið so blíð í hesi vikuni. Har hava teir eftirmett avrikið ímóti VB, og teir eru ikki nøgdir. Um tað skal eydnast betri ímóti GÍ, so er neyðugt við væl betri hugburði, og Ove Flindt Bjerg, KÍ venjarin, sigur í Norðlýsinum í hesi vikuni, at tað er eingin orsøk at rokna við lættari uppgávu. Hann sammetir GÍ við sovandi úlv, sum tað sigur seg sjálvt er torført og vandamikið at koma í holtur við.

KÍ venjarin sigur seg rokna við, at slagið fer at standa um miðvøllin, men hann vísir eisini á týdningin av, at KÍ fær spælið at ganga eftir sínum treytum.

Ovi Nysted var leikbannaður ímóti VB. Hann verður aftur í KÍ miðverjuni í morgin. Og so er spurningurin, um Karstin Joensen fer at fáa møguleikan ímillum stólparnar hesa ferð. Karstin var skaddur í nakrar vikur, men nú eru tvær vikur síðani, at hann aftur fór at venja. Tað varð av fleiri roknað við, at hann skuldi fáa møguleikan ímóti VB, men venjarin valdi at geva unglingaspælaranum Mathiasi Samuelsen enn ein møguleika, og ungi málverjin stóð seg væl.

KÍ hevur seinnu árini staðið seg væl í Sarpigerði. Teir hava vunnið trý tey seinastu árini, og síðsti GÍ heimasigurin á klaksvíkingum var í 2001, tá ið teir vunnu 5-1.

B36-EB/Streymur:

# B36 skal hava ein sigur

**Kravið til B36 sunnudagin er ein sigur, um fólk ikki skal byrja at tosa um eina kreppu í árstalsfelagnum. Men mótstøðumenninir úr EB/Streymi ætla sær eisini øll trý stigini**

UPPTAKT

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

B36 hevur fingið eina stak vánaliga byrjan upp á kappingarárið 2005. Ein ósigur fyri NSÍ í Gundadali og ein heppin javnleikur móti uppflytarunum TB á Tvøroyri er ikki nóg gott, tá ið málið er at vinna FM-heitið. Hetta ásanna teir í B36 eisini, og tí er kravið sunnudagin, tá ið EB/Streymur kemur á vitjan ein sigur.

**Ivi um Klæmint**

Manningin hjá B36 til dystin sunnudagin verður allarhelst tann sama sum á Tvøroyri. Ivi er tó um stríðsmannin á miðvøllinum Klæmint Matras, sum hevur ein skaða at dragast við. Klæmint hevur ikki vant í vikuni, tí roynt hevur verið at spara hann í eini roynd at fáa hann kláran til dystin móti sundalagsmonnum.

Verjuleikarin hjá B36, Herbert í Lon Jacobsen, sigur, at teir eru ógvuliga svangir eftir stigunum, og tað er ikki nóg gott bert at hava fingið tað eina stig til høldar, nú tvey umfør eru farin aftur um bak.

- Um vit ikki fáa ein sigur sunnudagin, so fara fólk at tosa um kreppu. Tað noyðast vit at liva við, tí vit spæla við B36, og málið er føroyameistaraheitið. Tì haldi eg eisini, at tað eigur at verða soleiðis, at fólk skulu hava loyvi at tosa um kreppu, um vit ikki koma í gongd nú, sigur Herbert í Lon Jacobsen.

**Nógv ivamál hjá sundalagsmonnum**

Hjá EB/Streymur er greitt, at teir noyðast at verða fleiri týðandi leikarar fyriuttan. Verjuleikarin Fróði Clementsen er framvegis skaddur, og hann verður tí ikki við móti barndómsfelagnum. Harumframt er greitt, at heldur ikki Hallur Jacobsen verður tøkur til dystin í Gundadali.

Toppskjúttin í landskappingini í fjør, Sonni L. Petersen, var ikki við móti Skála seinasta sunnudagin, tí at hann lá sjúkur, men hóskvøldið vandi hann við aftur fyri fyrstu ferð, og hann verður tí við í hópinum. Spurningurin er so, um hann verður millum teir fyrstu ellivu, ella um ungi Leif Nicalssen fær ein møguleika afturat í álopinum.

Royndi verjuleikarin Andrej Pacek hevur verið skaddur, men er farin at venja aftur, og hann verður óivað við sunnudagin.

Ein av royndaru leikarunum hjá EB/Streymi er Jákup Martin Joensen. Hann sigur, at teir vænta sær ein truplan dyst sunnudagin, tí at B36-leikararnir eru ógvuliga svangir eftir einum sigri. Hinvegin heldur Jákup Martin, at tað kann verða ein fyrimunur fyri EB/Streym, at tað er so stórt trýst á heimaliðið. Hann leggur afturat, at tað er einki at ivast í, at EB/-Streymur fer eftir øllum trimum stigunum í Gundadali sunnudagin.

NSÍ-TB:

# NSÍ roknar við stórari avbjóðing

**Á Tvøroyri halda teir, at avrikið ímóti B36 ber grundarlag fyri góðum treysti við sær, nú teir fyri aðru ferð skulu á Skálafjørðin**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

*joannes@sosialurin.fo*

Í fyrsta umfarinum var TB á Skála. Har løgdu teir rygg til trivaligt tap, og tað var beinanvegin at spádomar hoyrdust um kanónføði í bestu deildini.

Síðsta sunnudag vitjaðu silvurvinnararnir í B36 á Sevmýri. Tá endaði tað málleyst. Tvøràmenn vóru nøgdir við, at tað eftir stórtapið á Skála eydnaðist at halda tætt í verjuni, men teir harmast um, at tað ikki eydnaðist at fáa mál burtur úr onkrum av nógvu málmøguleikunum, sum teir høvdu.

Í B36 málinum var tað landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen, sum vardi fyri. Í morgin fara TB spælararnir at standa yvir fyri hinum landsliðsmálverjanum, Jens Martini Knudsen. Allir tvøràmenninir, sum vóru við ímóti B36, eru tøkir undan avbjóðingini í Runavík.

Í NSÍ iðraðu teir seg um, at teir í evstu løtu mistu eitt stig í Gundadali ímóti HB. Í báðum førunum, tá ið HB fekk mál, sveik okkurt, sum tað vóru klokkuklárar avtalur um, siga teir í Runavík, sum kortini ikki eru misnøgdir við, at tað eftir tvær ferðir í høvuðsstaðnum eru trý stig á kontini.

Undan TB vitjanini eru allir NSÍ spælararnir klárir at spæla. Hóskvøldið vandu teir eina løtu í kavanum. Einasta lítla ivamálið var Sjúrður Jacobsen, sum fekk lítlan vøddaskaða ímóti HB og fyrrapartin av vikuni ikki hevur vant saman við hinum.

Tað hevur nógvu tey seinnu árini verið langt ímillum landskappingardystirnar millum NSÍ og TB. Í Runavík hevur NSÍ vunnið tvær tær seinastu ferðirnar, feløgini hava dystast - 5-1 í 2002 og 1-0 í 1998. Síðsti TB sigurin í Runavík er tiggju ára gamalur. Í 1995 vann TB 3-2 í Runavík ímóti NSÍ, sum flutti niður hetta árið.